# Árs- og samtaksfrásøgn 2008

NORÐOYA SPARIKASSI

NORÐOYA SPARIKASSI

# Árs- og samtaksfrásøgn 2008

NORÐOYA SPARIKASSI

NORÐOYA SPARIKASSI

Ósávegur 1
Postboks 149
FO-710 Klaksvík
Tel. 475000
Fax 476000
ns@ns.fo
www.ns.fo

Deildin í Leirvík
Kulibakki 11
FO-520 Leirvík
Tel. 475100
Fax 476010

Deildin í Saltangará
Heiðavegur 21
FO-600 Saltangará
Tel. 475000
Fax 476012

Deildin í Tórshavn
Hoyvíksvegur 67
FO-100 Tórshavn
Tel. 475000
Fax 476015

# UM SPARIKASSAN

**Sparikassin**

er sjálveigandi stovnur. Hvørki stovnarar ella onnur eru ánarar av peningaogn ella avlopi sparikassans.

**Avlop sparikassans**

verður - burtursæð frá tí, sum verður nýtt til vælgerandi og almenngagnlig endamál – lagt afturat eginpeningi sparikassans, alt til tryggjan av sparipeninginum.

**Í sparikassanum**

eru tygum altíð vælkomin, og starvsfólkið her er til reiðar at geva tygum leiðbeiningar og upplýsingar í fíggjarspurningum.

## INNIHALDSYVIRLIT


Lykla- og høvuðstøl, Samtak 6
Lykla- og høvuðstøl, Norðoya Sparikassi 7
Ársfrágreiðing 8
Leiðsluátekning 10
Átekningar frá óheftum grannskoðara 11
Rakstrarroknskapur 12
Fíggjarstøða 31. desember 13
Kapitalflytingar og solvensuppgerð 14
Peningastreymsroknskapur 15
Viðmerkingar 16
Nýttur roknskaparháttur 24

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

**Samtak**

| Lyklatøl | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 18,7 | 17,2 | 15,2 |
| Kjarnukapitalprosent | 18,7 | 17,2 | 14,9 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 10,6 | 9,4 | -20,4 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 8,7 | 7,8 | -17,6 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,8 | 1,6 | 0,4 |
| Rentuváði | 1,7 | 0,5 | 1,4 |
| Gjaldoyrastøða | 0,1 | 0,2 | 1,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 111,4 | 107,2 | 95,6 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 25,3 | 64,2 | 158,3 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 68,6 | 52,4 | 85,6 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,1 | 0,6 | 0,7 |
| Burturleggingarprosent | 1,3 | 1,0 | 2,6 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,0 | -0,1 | 2,2 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 33,9 | 21,7 | 2,7 |
| Útlán í mun til eginpening | 4,8 | 5,4 | 6,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 67.186 | 80.181 | 75.203 |
| Virðisjavnan | 2.367 | -2.089 | -26.768 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | 0 | 764 | -1.266 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 3.224 | 4.578 | 1.964 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **72.777** | **83.434** | **49.133** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 39.685 | 52.344 | 57.174 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 1.382 | 2.550 | 7.966 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 208 | -1.938 | 48.126 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **31.502** | **30.478** | **-64.133** |
| Skattur | 5.732 | 5.100 | -9.023 |
| **Ársúrslit** | **25.770** | **25.378** | **-55.110** |
| **Fíggjarstøða** | | | |
| Útlán | 1.486.785 | 1.810.017 | 1.858.858 |
| Virðisbrøv | 153.371 | 263.738 | 229.884 |
| Innlán | 1.354.286 | 1.706.235 | 1.993.809 |
| Javni | 1.791.509 | 2.284.143 | 2.463.998 |
| Eginpeningur | 309.526 | 337.037 | 289.057 |

# LYKLA- OG HØVUÐSTØL

**Norðoya Sparikassi**

| Lyklatøl | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 29,6 | 25,5 | 19,0 | 17,5 | 15,1 |
| Kjarnukapitalprosent | 29,6 | 25,5 | 19,0 | 17,5 | 14,8 |
| Renting av eginpeningi áðrenn skatt | 8,7 | 10,6 | 10,6 | 9,4 | -20,1 |
| Renting av eginpeningi aftaná skatt | 6,8 | 8,5 | 8,7 | 7,9 | -17,6 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,6 | 1,9 | 1,8 | 1,6 | 0,4 |
| Rentuváði | 1,0 | 1,8 | 1,7 | 0,5 | 1,4 |
| Gjaldoyrastøða | 0,1 | 0,2 | 0,1 | 0,2 | 1,2 |
| Útlán og burturleggingar í mun til innlán | 107,6 | 92,9 | 111,5 | 108,1 | 94,9 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 106,9 | 156,8 | 27,6 | 66,6 | 156,9 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til eginpening | 17,6 | 35,9 | 68,6 | 52,4 | 85,6 |
| Partur av ágóða við niðursettari rentu | 0,4 | 0,0 | 0,1 | 0,6 | 0,7 |
| Burturleggingarprosent | 3,2 | 1,9 | 1,3 | 1,0 | 2,6 |
| Taps- og burturleggingarprosent í árinum | 0,3 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 2,2 |
| Útlánsvøkstur í árinum | 9,2 | 14,4 | 35,5 | 21,6 | 1,6 |
| Útlán í mun til eginpening | 3,7 | 3,9 | 4,9 | 5,4 | 6,4 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 58.197 | 60.155 | 68.290 | 83.221 | 78.876 |
| Virðisjavnan | -471 | -686 | 1.298 | -2.089 | -16.168 |
| Úrslit av kapitaláhugamálum | -40 | 499 | 463 | 130 | -17.845 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 672 | 827 | 2.391 | 2.082 | 1.126 |
| **Úrslit av fíggjarpostum** | **58.358** | **60.795** | **72.442** | **83.344** | **45.989** |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 32.705 | 32.016 | 39.452 | 52.255 | 56.110 |
| Avskrivingar, ítøkilig ogn | 1.069 | 981 | 1.382 | 2.550 | 7.966 |
| Tap og burturleggingar, skuldarar | 2.684 | -858 | 208 | -1.939 | 45.126 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **21.900** | **28.656** | **31.400** | **30.478** | **-63.213** |
| Skattur | 4.753 | 5.650 | 5.630 | 5.100 | -8.103 |
| **Ársúrslit** | **17.147** | **23.006** | **25.770** | **25.378** | **-55.110** |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 970.605 | 1.110.576 | 1.504.597 | 1.828.888 | 1.858.858 |
| Virðisbrøv | 156.830 | 176.986 | 153.357 | 259.639 | 229.884 |
| Innlán | 932.098 | 1.219.133 | 1.368.755 | 1.710.053 | 2.009.083 |
| Javni | 1.202.537 | 1.513.846 | 1.759.747 | 2.253.280 | 2.450.176 |
| Eginpeningur | 259.576 | 282.647 | 309.526 | 337.037 | 289.057 |

# ÁRSFRÁGREIÐING

## Ársúrslitið

Úrslit sparikassans í 2008 gjørdist eitt hall áðrenn skatt uppá 64 mió.kr., í mun til eitt yvirskot uppá 30 mió.kr. í 2007. Endaliga ársúrslitið gjørdist eitt hall uppá 55 mió.kr. í mun til eitt yvirskot uppá 25 mió.kr. í 2007.

## Inntøkur

Netto rentuinntøkurnar vóru 62 mió.kr. í 2008 í mun til 67 mió.kr. í 2007. Hetta er ein minking í netto rentuinntøkunum uppá 5 mió.kr. í mun til árið fyri. Henda minking stavar í høvuðsheitum frá, at rentan til lánistovnar var munandi hægri í 2008 enn í 2007 saman við at rentumarginalur sparikassans var 0,5 % lægri í 2008 enn í 2007.

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar fullu somuleiðis við 5 mió.kr., úr kr. 80 mió.kr. í 2007 til 75 mió.kr. í 2008. Ein minking uppá 6 %.

Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra og partabrøvum gjørdist í 2008 eitt hall uppá 27 mió.kr., móti einum halli uppá 2 mió.kr. í 2007.

## Útreiðslur

Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. eru øktar við 4 mió. kr. í 2008 í mun til 2007 úr 52 mió.kr. í 2007 til 56 mió.kr. í 2008. Starvsfólkatalið er hækkað við 4 og eru vit nú 51 fólk í sparikassanum umroknað til fulla tíð. Øking í starvsfólkaútreiðslum svara til knappan helmingin av vøkstrinum í rakstrarútreiðslunum, meðan hin helmingurin stavar frá gjaldi til Det Private Beredskab og Bankapakka I.

Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum vóru 8 mió.kr. í 2008 í mun til 3 mió. Kr. í 2007. Hækkingin stavar frá, at sparikassin hevur valt at niðurskriva ítøkiligar ognir við 5 mió.kr. eyka í 2008.

Netto avskrivingar og burturleggingar uppá útlán er ein útreiðsluføring uppá 48 mió.kr. í 2008 í mun til eina inntøkuføring uppá 2 mió.kr. í 2007. Vit meta, at virðini bæði í vinnuni og á fastari ogn eru fallin munandi í 2008 í mun til undanfarin ár. Tá einki tíðir á, at hesi virði fara at hækka aftur í bræði, hava vit valt at seta pening av móti tapi, har talan eru um kundar, ið eru í vanda fyri, at teir ikki at fara at klára tað. Størri helmingurin av burturleggingunum stava frá lánum og kredittum innan fiskivinnuna á sjógvi og landi. Útlán fráskrivað burturleggingar hjá sparikassanum í hesi vinnugrein er nú farin niðurum 100 mió.kr.

## Gjaldføri og solvensur

Gjaldførið var 603 mió.kr við árslok 2008. Tá er trekningsrættur í Danmarks Nationalbank íroknaður. Gjaldførið var við árslok 70 % av stuttfreistaðu skyldum sparikassans. Lógin krevur 15%. Av samlaðu skyldum sparikassans var gjaldførið við árslok 26 %. Lógin krevur her 10%.

Solvensur sparikassans fall við 2 %, frá 17,2 % við árslok 2007 til 15,2 % við árslok 2008. Lógin krevur 8 %.

## Fíggjarstøðan

Útlán sparikassans vóru við árslok 2008 1.859 mió.kr., og eru tey vaksin við 3 % í 2008.

Innlánið er í sama tíðarskeiði økt við 17 % og er nú 1.994 mió.kr. Útlánsprosentið er sostatt farið úr 106 % í 2007 niður í 93 % við árslok 2008.

Skuld til aðrar peningastovnar er minkað við 100 mió.kr. úr 220 mió.kr. við árslok 2007, til 120 mió. kr. við árslok 2008.

Fíggjarstøða sparikassans javnvigar við 2.437 mió.kr. við árslok 2008. Hetta svarar til ein vøkstur uppá 7 %.

Eginogn sparikassans er nú 289 mió.kr. Tað vil siga at eginognin er minkað í 2008 við 48 mió.kr. Tá niðurskrivingar verða útreiðsluførdar í rakstrarroknskapinum, meðan uppskrivingar verða bókaðar beinleiðis yvir eginognina, eru uppskrivingar bókaðar fyri 7 mió.kr. beinleiðis yvir eginognina.

## Býti av ársúrsliti

Nevndin skjýtur upp, at ársúrslitið uppá -55 mió.kr. saman við fluttum vinningi frá undanfarnum árum uppá 329 mió. kr. og gávugrunninum uppá 1 mió.kr., ella í alt 276 mió. kr, verður lagt 1 mió.kr. í gávugrunnin og 275 mió. kr. verða fluttar til næsta ár.

## Starvsfólk

Starvsfólkatalið í sparikassanum var við árslok 50,7 umroknað til fulla tíð, ímóti 46,8 fólkum í 2007. Ein hækking upp á 3,9 ársverk.

## Framtíðin

Eftir at roknskapurin hjá Norðoya Sparikassa er avgreiddur, eru ikki hendar broytingar, ið eru av týdningi, tá metast skal um roknskaparúrslit og fíggjarligu støðu sparikassans.

Við altjóða fíggjarkreppuni í huga, og teimum avbjóðingum okkara høvuðsvinna stendur fyri, vænta vit at árið 2009 verður eitt ár við stórum avbjóðingum. Vit vænta tí, at uppsparingin í samfelagnum kemur at vaksa samstundis sum skuld verður niðurgoldin og at lánihugurin verður sera avmarkaður.

## LEIÐSLUÁTEKNING

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið árs- og samtaksfrásøgn fyri 2008 fyri Norðoya Sparikassa. Árs- og samtaksfrásøgn er greidd samsvarandi lóg um fíggjarligt virksemið.

Tað er okkara fatan, at árs- og samtaksfrásøgn gevur eina rættvísa mynd av stovnsins ognum, skyldum og fíggjarstøðu við ársenda og úrslitinum fyri 2008.

Nevndin vil viðmæla aðalfundinum til at góðkenna árs- og samtaksfrásøgnina fyri 2008.

Klaksvík, hin 26. mars 2009

Stjórn

Eyðfinn Reyðberg

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| Óli Marnar Christiansen<br>*formaður* | Finn Kjølbro<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Páll Klettskarð | Erling Petersen | Jóannes Hansen |
| Julianna Thomsen | Eyðun Nolsøe | Guðrið L. Olsen |

# ÁTEKNING FRÁ ÓHEFTUM GRANNSKOÐARA

Vit hava grannskoðað árs- og samtaksfrásøgnina hjá Norðoya Sparikassa fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008 við leiðsluátekning, leiðslufrágreiðing, nýttum roknskaparhátti, rakstrarroknskapi, fíggjarstøðu, frágreiðing um eginogn, gjaldførisfrágreiðing og notum. Ársfrásøgnin er gjørd eftir lóg um fíggjarligt virksemi, umframt kunngerðum um fíggjarligar frásagnir fyri fíggjarstovnar.

## Ábyrgd leiðslunnar av ársfrásøgnini

Leiðslan hevur ábyrgdina av at gera eina árs- og samtaksfrásøgn, ið gevur eina rættvísandi mynd í samsvari við upplýsingarkrøv fyri fíggjarligt virksemi. Henda ábyrgd ber í sær, at stovnurin støðugt hevur tað innanhýsis eftirlit, ið er neyðugt fyri at gerast kann ein árs- og samtaksfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd uttan skeivleikar av týdningi, og uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum, at nýttur verður hóskandi roknskaparháttur og at roknskaparligu metingarnar, ið framdar eru, eftir umstøðunum mugu ætlast at vera rímiligar.

## Grannskoðanin og ábyrgd grannskoðarans

Okkara ábyrgd er við støði í grannskoðanini at gera eina niðurstøðu um árs- og samtaksfrásøgnina. Vit hava grannskoðað í samsvari við galdandi grannskoðarareglur, ið krevja, at vit halda tey etisku krøvini og leggja til rættis og grannskoða fyri at fáa eina grundaða vissu fyri, at at tað ikki eru týðandi skeivleikar í árs- og samtaksfrásøgnini.

Grannskoðanin ber í sær, at gjørt verður tað arbeiði, ið skal til fyri at fáa grannskoðaraprógv fyri upphæddum og upplýsingum í árs- og samtaksfrásøgnini. Grannskoðarin metir um, hvat arbeiði skal gerast, herundir metir hann um váðan fyri týðandi skeivleikum í árs- og samtaksfrásøgnini, uttan mun til um skeivleikarnir standast av sviki ella mistøkum. Grannskoðarin metir eisini um innanhýsis eftirlitið, ið er neyðugt, fyri at stovnurin kann gera eina árs- og samtaksfrásøgn, sum gevur eina rættvísandi mynd. Hetta verður gjørt fyri at leggja grannskoðanina til rættis eftir umstøðunum og ikki at gera eina niðurstøðu um góðskuna á innanhýsis eftirlitinum. Grannskoðanin umfatar eisini støðutakan til, um roknskaparhátturin, ið leiðslan hevur nýtt er hóskandi, um roknskaparligu metingarnar, sum leiðslan hevur gjørt eru rímiligar, og ein heildarmetan av samlaðu árs- og samtaksfrásøgnini.

Tað er okkara fatan, at vit hava fingið nøktandi grannskoðaraprógv, sum er hóskandi grundarlag fyri niðurstøðu okkara.

Grannskoðanin hevur ikki givið orsøk til fyrivarni.

## Niðurstøða

Tað er okkara fatan, at árs- og samtaksfrásøgnin gevur eina rættvísandi mynd av ognum og skyldum stovnsins tann 31. desember 2008, umframt úrsliti av stovnsins virksemi og peningastreymi fyri roknskaparárið 1. januar – 31. desember 2008 í samsvari við upplýsingarkrøv fyri fíggjarligt virksemi.

Nykøbing Mors, hin 26. mars 2009

BDO ScanRevision
Statsautoriseret revisionsaktieselskab

Jens Peter Egebjerg Hansen
Statsautoriseret revisor

Klaksvík, hin 26. mars 2009

Símun Absalonsen
løggildur grannskoðari

# RAKSTRARROKNSKAPUR

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| 153.070 | 125.612 | 1 | Rentuinntøkur o.a. | 153.453 | 126.956 |
| 90.824 | 58.147 | 2 | Rentuútreiðslur o.a. | 87.700 | 56.451 |
| **62.246** | **67.465** | | **Netto rentuinntøkur** | **65.753** | **70.505** |
| 1.801 | 2.532 | | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 1.467 | 2.532 |
| 11.715 | 11.110 | | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 12.215 | 11.110 |
| 559 | 926 | | Útreiðslur til kostnað og provisión | 559 | 926 |
| **75.203** | **80.181** | | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **78.876** | **83.221** |
| -26.768 | -2.089 | 3 | Virðisjavnan av lánsbrøvum, gjaldoyra o.ø. | -16.168 | -2.089 |
| 1.964 | 4.578 | 4 | Aðrar vanligar inntøkur | 1.126 | 2.082 |
| 56.313 | 52.231 | 5 | Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. | 56.085 | 52.142 |
| 7.966 | 2.550 | 6 | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 7.966 | 2.550 |
| 861 | 113 | 7 | Aðrar vanligar útreiðslur | 25 | 113 |
| 48.126 | -1.939 | | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 45.126 | -1.939 |
| -1.266 | 764 | | Úrslit av kapitalpørtum í assosieraðum og tilknýttum fyritøkum | -17.845 | 130 |
| **-64.133** | **30.478** | | **Úrslit av vanligum rakstri áðrenn skatt** | **-63.213** | **30.478** |
| -9.023 | 5.100 | 23 | Skattur | -8.103 | 5.100 |
| **-55.110** | **25.378** | | **Ársúrslit** | **-55.110** | **25.378** |
| | | | **Býti av rakstrarúrsliti** | | |
| -55.110 | 25.378 | | Ársúrslit | -55.110 | 25.378 |
| 1.000 | 1.000 | | Flutt úr gávugrunni | 1.000 | 1.000 |
| 724 | 0 | | Regulering primo | 724 | 0 |
| 329.125 | 303.747 | | Flutt frá undanfarnum árum | 329.125 | 303.747 |
| **275.739** | **330.125** | | **Til taks tilsamans** | **275.739** | **330.125** |
| 1.000 | 1.000 | | Lagt í gávugrunn | 1.000 | 1.000 |
| 274.739 | 329.125 | | At flyta til næsta ár | 274.739 | 329.125 |
| **275.739** | **330.125** | | **Tilsamans nýtt av peningi, ið er til taks** | **275.739** | **330.125** |

# FÍGGJARSTØÐA 31. DESEMBER

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| | | | **Ogn** | | |
| 39.147 | 27.140 | | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 39.112 | 27.060 |
| 205.949 | 79.321 | 8 | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 205.949 | 79.321 |
| 1.858.858 | 1.810.017 | 9 | Útlán | 1.858.858 | 1.828.888 |
| 174.482 | 194.685 | 10 | Lánsbrøv | 174.482 | 194.685 |
| 55.402 | 69.053 | 11 | Partabrøv o.a. | 55.402 | 64.954 |
| 2.461 | 13.549 | 11 | Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum | 2.461 | 0 |
| 995 | 2.771 | 11 | Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum | 601 | 12.078 |
| 85.622 | 73.829 | 12 | Ítøkiligar ognir | 85.087 | 36.468 |
| 14.082 | 13.778 | 13 | Aðrar ognir | 28.224 | 9.826 |
| **2.436.998** | **2.284.143** | | **Ogn tilsamans** | **2.450.176** | **2.253.280** |
| | | | **Skuld og eginpeningur** | | |
| | | | **Skuld** | | |
| 119.866 | 220.000 | 14 | Skuld til peningastovnar | 119.866 | 190.000 |
| 1.993.809 | 1.706.235 | 15 | Innlán | 2.009.083 | 1.710.053 |
| 30.880 | 15.292 | | Onnur skuld | 28.784 | 13.224 |
| 3.386 | 5.579 | 16 | Burturleggingar til útreiðslur | 3.386 | 2.966 |
| **2.147.941** | **1.947.106** | | **Skuld tilsamans** | **2.161.119** | **1.916.243** |
| | | | **Eginpeningur** | | |
| 7.066 | 6.912 | 17 | Ábyrgdarpeningur | 7.066 | 6.912 |
| 1.000 | 1.000 | | Gávugrunnur | 1.000 | 1.000 |
| 6.252 | 0 | | Uppskrivingargrunnurin | 6.252 | 0 |
| 329.125 | 303.747 | | Flutt frá undanfarnum árum | 329.125 | 303.747 |
| 724 | 0 | | Regulering primo | 724 | 0 |
| -55.110 | 25.378 | | Flutt frá ársúrsliti | -55.110 | 25.378 |
| **289.057** | **337.037** | | **Eginpeningur tilsamans** | **289.057** | **337.037** |
| **2.436.998** | **2.284.143** | | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.450.176** | **2.253.280** |
| | | 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| 186.580 | 266.338 | | Ábyrgdir o.a. | 186.580 | 266.338 |
| 28.029 | 14.782 | | Aðrar skyldir | 28.029 | 14.782 |
| **214.609** | **281.120** | | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **214.609** | **281.120** |

# KAPITALFLYTINGAR OG SOLVENSUPPGERÐ

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| | | | **Kapitalflytingar** | | |
| 6.912 | 4.779 | | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.912 | 4.779 |
| 278 | 2.286 | | Tilgongd í árinum | 278 | 2.286 |
| 124 | 153 | | Frágongd í árinum | 124 | 153 |
| **7.066** | **6.912** | | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **7.066** | **6.912** |
| 1.000 | 1.000 | | Gávugrunnur við ársbyrjan | 1.000 | 1.000 |
| 1.000 | 1.000 | | Flutt til yvirskotsbýti | 1.000 | 1.000 |
| 1.000 | 1.000 | | Flutt frá býti av ársvinningi | 1.000 | 1.000 |
| **1.000** | **1.000** | | **Gávugrunnur við ársenda** | **1.000** | **1.000** |
| 0 | 0 | | Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársbyrjan | 0 | 0 |
| 1.093 | 0 | | Regulering Primo | 1.093 | 0 |
| -1.093 | 0 | | Flutt frá býti av ársvinningi | -1.093 | 0 |
| **0** | **0** | | **Aðrir grunnar við nettouppskriving eftir innara virði við ársenda** | **0** | **0** |
| 0 | 0 | | Uppskrivingargrunnurin við ársbyrjan | 0 | 0 |
| 6.252 | 0 | | Uppskrivað í árinum | 6.252 | 0 |
| **6.252** | **0** | | **Uppskrivingargrunnurin við ársenda** | **6.252** | **0** |
| 329.125 | 303.747 | | Flutt avlop við ársbyrjan | 329.125 | 303.747 |
| 724 | 0 | | Regulering primo | 724 | 0 |
| 0 | 0 | | Flutt frá gávugrunni, netto | 0 | 0 |
| -55.110 | 25.378 | | Flutt frá ársúrsliti | -55.110 | 25.378 |
| **274.739** | **329.125** | | **Flutt avlop við ársenda** | **274.739** | **329.125** |
| **289.057** | **337.037** | | **Eginpeningur tilsamans** | **289.057** | **337.037** |
| | | | **Solvensuppgerð** | | |
| 274.206 | 337.037 | | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg | 274.206 | 337.037 |
| 280.458 | 337.037 | | Ábyrgdarkapitalur aftaná frádrøg | 280.458 | 337.037 |
| 1.609.254 | 1.679.809 | | Vektaðar ognir, ikki íroknaðar handilsgoymslu | 1.622.467 | 1.649.025 |
| 182.012 | 257.129 | | Vektaði tøl undir strikuni | 182.012 | 257.129 |
| 51.960 | 24.932 | | Vektaði tøl við marknaðarváða | 51.960 | 24.932 |
| **1.843.226** | **1.961.870** | | **Vektað tøl tilsamans** | **1.856.439** | **1.931.086** |
| 15,2% | 17,2% | | Solvensprosent sambært BSL §21, stk. 1 | 15,1% | 17,5% |
| 14,9% | 17,2% | | Kjarnukapitalur aftaná frádrøg í prosentum av vektaðum tølum tilsamans | 14,8% | 17,5% |

# PENINGASTREYMSROKNSKAPUR

| Samtak 2008 | Samtak 2007 | Viðm. | | Norðoya Sparikassi 2008 | Norðoya Sparikassi 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | | **Rakstur** | | |
| -55.110 | 25.378 | | Ársúrslit eftir skatt | -55.110 | 25.378 |
| | | | Broytingar viðv. upphæddum uttan gjaldførisárin: | | |
| -2.290 | 187 | | Útsettur skattur | 324 | 187 |
| 7.966 | 2.550 | | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 7.966 | 2.550 |
| 48.126 | -1.939 | | Avskrivingar og burturleggingar uppá skuldarar (netto) | 45.126 | -1.939 |
| 97 | -56 | | Burturleggingar til útreiðslur | 97 | -56 |
| **-1.211** | **26.120** | | **Í alt frá rakstri** | **-1.597** | **26.120** |
| | | | **Rakstrarkapitalur** | | |
| -93.968 | -321.293 | | Útlán | -75.096 | -322.352 |
| 287.574 | 351.948 | | Innlán | 299.029 | 341.298 |
| -100.134 | 117.000 | | Skuld til peningastovnar | -70.134 | 127.000 |
| -3.303 | -5.892 | | Aðrar ognir | -18.397 | -5.573 |
| 15.587 | -3.956 | | Onnur skuld | 15.560 | -2.407 |
| **105.756** | **137.807** | | **Tilsamans frá rakstrarkapitali** | **150.962** | **137.966** |
| | | | **Íløgur** | | |
| 20.202 | -98.788 | | Lánsbrøv | 20.202 | -98.788 |
| 14.375 | -11.579 | | Partabrøv | 19.275 | -7.494 |
| 19.118 | 2.734 | | Kapitalpartar | 6.270 | -630 |
| -19.757 | -17.249 | | Ítøkiligar ognir | -56.585 | -18.164 |
| **33.938** | **-124.882** | | **Tilsamans frá íløgum** | **-10.838** | **-125.076** |
| | | | **Fígging** | | |
| 154 | 2.133 | | Ábyrgdarpeningur | 154 | 2.133 |
| 138.637 | 41.179 | | Broytingar í gjaldføri | 138.680 | 41.143 |
| 106.457 | 65.278 | | Gjaldføri við ársbyrjan | 106.381 | 65.238 |
| **245.094** | **106.457** | | **Gjaldføri við ársenda** | **245.061** | **106.381** |

# VIÐMERKINGAR

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| | | 1 | **Rentuinntøkur o.a.** | | |
| 4.478 | 3.565 | | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 4.478 | 3.565 |
| 141.645 | 118.091 | | Útlán | 142.028 | 119.435 |
| 6.947 | 3.956 | | Lánsbrøv | 6.947 | 3.956 |
| **153.070** | **125.612** | | **Rentuinntøkur tilsamans** | **153.453** | **126.956** |
| | | 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| 15.280 | 9.437 | | Innistandandi hjá peningastovnum | 12.021 | 7.737 |
| 75.155 | 48.429 | | Innlán | 75.290 | 48.433 |
| 389 | 281 | | Ábyrgdarpeningur | 389 | 281 |
| **90.824** | **58.147** | | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **87.700** | **56.451** |
| | | 3 | **Virðisjavnan** | | |
| 971 | 1.192 | | Lánsbrøv | 971 | 1.192 |
| -27.293 | -3.299 | | Partabrøv | -16.694 | -3.299 |
| -446 | 18 | | Gjaldoyra | -445 | 18 |
| **-26.768** | **-2.089** | | **Virðisjavnan tilsamans** | **-16.168** | **-2.089** |
| | | 4 | **Aðrar vanligar inntøkur** | | |
| 474 | 416 | | Nettoúrslit av rakstri av fastari ogn | 474 | 416 |
| 1.490 | 4.162 | | Aðrar vanligar inntøkur | 652 | 1.666 |
| **1.964** | **4.578** | | **Aðrar vanligar inntøkur tilsamans** | **1.126** | **2.082** |
| | | 5 | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a.** | | |
| 600 | 600 | | Løn og samsýning til nevnd | 600 | 600 |
| 2.097 | 2.097 | | Løn, eftirløn og samsýning til stjórn | 2.097 | 2.097 |
| 125 | 133 | | Løn og samsýning til umboðsráð | 125 | 133 |
| 17.841 | 17.075 | | Løn til starvsfólk | 17.841 | 17.075 |
| 3.051 | 2.483 | | Eftirløn til starvsfólk | 3.051 | 2.483 |
| 1.814 | 1.569 | | Útreiðslur til sosiala trygd o.a. | 1.814 | 1.569 |
| **25.528** | **23.957** | | **Starvsfólkaútreiðslur tilsamans** | **25.528** | **23.957** |
| 30.785 | 28.274 | | Aðrar umsitingarútreiðslur | 30.557 | 28.185 |
| **56.313** | **52.231** | | **Útreiðslur til starvsfólk, umsiting o.a. tilsamans** | **56.085** | **52.142** |

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| 50,7 | 46,8 | 5 | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk (framhald) | 50,7 | 46,8 |
| **1.196** | **699** | | **Útreiðslur til grannskoðarar** | **1.166** | **642** |
| 474 | 65 | | Harav annað arbeiði enn grannskoðan | 474 | 65 |
| | | | | | |
| | | 6 | **Av- og niður-skrivingar av ítøkiligum ognum** | | |
| 1.214 | 623 | | Bygningar | 1.214 | 623 |
| 6.752 | 1.927 | | Maskinur og innbúgv | 6.752 | 1.927 |
| **7.966** | **2.550** | | **Av- og niðurskrivingar av ítøkiligum ognum tilsamans** | **7.966** | **2.550** |
| | | | | | |
| | | 7 | **Aðrar vanligar útreiðslur** | | |
| 25 | 113 | | Útgoldið úr gávugrunninum | 25 | 113 |
| 836 | 0 | | Aðrar vanligar útreiðslur | 0 | 0 |
| **861** | **113** | | **Aðrar vanligar útreiðslur tilsamans** | **25** | **113** |
| | | | | | |
| | | 8 | **Ogn hjá peningastovnum o.ø.** | | |
| 56.105 | 59.338 | | Uttan uppsøgn | 56.105 | 59.338 |
| 149.844 | 19.983 | | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 149.844 | 19.983 |
| **205.949** | **79.321** | | **Ogn hjá peningastovnum o.ø. tilsamans** | **205.949** | **79.321** |
| | | | | | |
| | | 9 | **Útlán** | | |
| 27.792 | 29.920 | | Uttan uppsøgn | 27.792 | 48.792 |
| 24.405 | 29.723 | | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 24.405 | 29.723 |
| 85.181 | 113.562 | | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 85.181 | 113.562 |
| 372.535 | 433.581 | | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 372.535 | 433.581 |
| 1.348.945 | 1.203.231 | | Yvir 5 ár | 1.348.945 | 1.203.230 |
| **1.858.858** | **1.810.017** | | **Útlán tilsamans** | **1.858.858** | **1.828.888** |
| | | | | | |
| | | | **Akkumuleraðar burturleggingar** | | |
| 55.551 | 20.218 | | Burturlagt uppá útlán og ábyrgdir við ársenda | 55.551 | 20.218 |
| | | | Burturlagt við ársenda uppá ogn hjá peningastovnum | | |
| 0 | 0 | | og aðrar postar við kredittváða | 0 | 0 |
| **55.551** | **20.218** | | **Akumuleraðar burturleggingar tilsamans** | **55.551** | **20.218** |

| Samtak | | | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | Viðm. | | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | 9 | **Akkumuleraðar burturleggingar í % av** | | | | |
| 2,6% | 1,0% | | **bruttoútlánum og ábyrgdum við ársenda (framhald)** | | | 2,6% | 1,0% |
| 14.557 | 12.219 | | **Ikki renturoknað áogn við ársenda** | | | 14.557 | 12.219 |
| | | 10 | **Lánsbrøv** | | | | |
| 174.482 | 194.685 | | Skrásett á keypsskálum | | | 174.482 | 194.685 |
| | | 11 | **Partabrøv** | | | | |
| 13.492 | 39.838 | | Skrásett á keypsskálum | | | 13.492 | 39.838 |
| 41.910 | 29.215 | | Onnur | | | 41.910 | 25.116 |
| | | | | Úrslit | Eginogn | | |
| | | 11 | **Tilknýtt feløg,** | 2008 | 31.12.08 | | |
| | | | **Partur av eginpeningi** | 1.000 DKK | 1.000 DKK | | |
| 100% | 100% | | Sp/f Heim | | | 100% | 100% |
| 100% | 100% | | P/f Hjá Eli | -12 | 995 | 0% | 0% |
| 0 % | 100% | | P/f Fastognarfelagið Ósáv. 1 (strikað) | | | 0% | 100% |
| 100% | 100% | | P/f Vørður | | | 0% | 0% |
| 0% | 100% | | Sp/f Helnabrekka (strikað) | | | 0% | 0% |
| | | | **Millumverandi við tilknýtt feløg** | | | | |
| 0 | 0 | | Áogn í lánistovnum og tjóðbankum | | | 0 | 0 |
| 0 | 26.486 | | Útlán | | | 0 | 0 |
| **0** | **26.486** | | **Ogn tilsamans** | | | **0** | **0** |
| 0 | 0 | | Skuld til lánistovnar | | | 0 | 0 |
| 15.143 | 4.319 | | Áogn í Norðoya Sparikassi | | | 15.143 | 4.319 |
| **15.143** | **4.349** | | **Skuld tilsamans** | | | **15.143** | **4.319** |
| | | | | Úrslit | Eginogn | | |
| | | 11 | **Assosieraðar fyritøkur** | 2007 | 31.12.07 | | |
| | | | **Partur av partapeningi** | 1.000 DKK | 1.000 DKK | | |
| 50% | 50% | | Sp/f KÍ-Høllin | 200 | 2.330 | 50% | 0% |
| 49% | 49% | | Sp/f Miðlon | -1.202 | 13.329 | 49% | 0% |
| 49% | 49% | | Sp/f Ognarfelagið Saltangará | 4.784 | 4.796 | 49% | 0% |
| | | | **Millumverandi við assosieraðar fyritøkur** | | | | |
| 0 | 0 | | Áogn í lánistovnum og tjóðbankum | | | 0 | 0 |
| 61.270 | 19.273 | | Útlán | | | 61.270 | 0 |
| **61.270** | **19.273** | | **Ogn tilsamans** | | | **61.270** | **0** |
| 0 | 0 | | Skuld til lánistovnar | | | 0 | 0 |
| 605 | 2.360 | | Áogn í Norðoya Sparikassi | | | 605 | 0 |
| **605** | **2.360** | | **Skuld tilsamans** | | | **605** | **0** |

Viðm. 11

**Fíggjarligari støðisogn**

| | Tilknýttar fyritøkur 1.000 DKK | (1.000 kr.) Assosieraðar fyritøkur 1.000 DKK | Aðrir kapitalpartar 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Norðoya Sparikassi** | | | |
| Samlaður keypsprísur við ársbyrjan | 10.987 | 0 | 25.116 |
| Gjaldoyrakursjavning | 0 | 0 | 0 |
| Tilgongd | 0 | 3.076 | 9.354 |
| Frágongd | 500 | 0 | 1 |
| **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **10.487** | **3.076** | **34.469** |
| | | | |
| Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 1.093 | 0 | 724 |
| Úrslit | -17.230 | -615 | |
| Upp- og niðurskrivingar í árinum | | 0 | 6.717 |
| Onnur tilgongd | 6.252 | 0 | 0 |
| Onnur frágongd | | | |
| Afturførðar upp- og niðurskrivingar | | 0 | 0 |
| **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **-9.886** | **-615** | **7.441** |
| | | | |
| **Bókað virði við ársenda** | **601** | **2.461** | **41.910** |
| Bókað virði við ársbyrjan | 12.079 | 0 | 25.116 |
| | | | |
| **Samtak** | | | |
| Samlaður keypsprísur við ársbyrjan | 2.107 | 13.549 | 29.216 |
| Gjaldoyrakursjavning | 0 | 0 | 0 |
| Javning | -500 | -10.500 | 11.000 |
| Tilgongd | 0 | 0 | 354 |
| Frágongd | 600 | 0 | 1 |
| **Samlaður keypsprísur við ársenda** | **1.007** | **3.049** | **40.569** |
| | | | |
| Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársbyrjan | 665 | 0 | 0 |
| Regulering primo | 0 | 0 | 724 |
| Úrslit | -12 | -615 | 0 |
| Upp- og niðurskrivingar í árinum | 0 | 0 | 617 |
| Onnur tilgongd | -665 | 27 | 0 |
| Onnur frágongd | | | |
| Afturførðar upp- og niðurskrivingar | 0 | 0 | 0 |
| **Samlaðar upp- og niðurskrivingar við ársenda** | **-12** | **-588** | **1.341** |
| | | | |
| **Bókað virði við ársenda** | **995** | **2.461** | **41.910** |
| Bókað virði við ársbyrjan | 2.772 | 13.549 | 29.215 |

Viðm. 12

| **Ítøkiligar ognir** | Grundøki og bygningar 1.000 DKK | Tól og innbúgv 1.000 DKK | Tilsamans 1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Norðoya Sparikassi** | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 17.558 | 35.577 | 53.135 |
| Tilgongd | 39.719 | 10.944 | 50.663 |
| Frágongd | 0 | 330 | 330 |
| **Útveganarvirði við ársenda** | **57.277** | **46.191** | **103.468** |
| | | | |
| Uppskrivingar í árinum | 6.252 | | 6.252 |
| **Uppskrivingar við ársenda** | **6.252** | | **6.252** |
| | | | |
| Avskrivingar og niðurskrivingar við ársbyrjan | 4.767 | 11.900 | 16.667 |
| Avskrivingar í árinum | 214 | 3.052 | 3.266 |
| Niðurskrivingar í árinum | 1.000 | 3.700 | 4.700 |
| Afturførdar av- og niðurskrivingar | 0 | 0 | 0 |
| **Avskrivingar og niðurskrivingar við ársenda** | **5.981** | **18.652** | **24.633** |
| | | | |
| **Bókað virði við ársenda** | **57.548** | **27.539** | **85.087** |
| Bókað virði við ársbyrjan | 12.791 | 23.677 | 36.468 |
| | | | |
| Straksavskrivað av tølum og innbúgvi | | 0 | 0 |
| | | | |
| **Samtak** | | | |
| Útveganarvirði við ársbyrjan | 37.395 | 35.577 | 73.507 |
| Tilgongd | 40.254 | 10.944 | 51.198 |
| Frágongd | 19.837 | 330 | 20.702 |
| **Útveganarvirði við ársenda** | **57.812** | **46.491** | **104.003** |
| | | | |
| Uppskrivingar við ársbyrjan | 18.594 | | 18.594 |
| Afturførdar uppskrivingar | 18.594 | | 18.594 |
| Uppskrivingar í árinum | 6.252 | | 6.252 |
| **Uppskrivingar við ársenda** | **6.252** | | **6.252** |
| | | | |
| Avskrivingar og niðurskrivingar við ársbyrjan | 5.836 | 11.900 | 17.736 |
| Avskrivingar í árinum | 214 | 3.052 | 3.266 |
| Niðurskrivingar í árinum | 1.000 | 3.700 | 4.700 |
| Afturførdar av- og niðurskrivingar | 1.069 | 0 | 1.069 |
| **Avskrivingar og niðurskrivingar við ársenda** | **5.981** | **18.652** | **24.633** |
| | | | |
| **Bókað virði við ársenda** | **58.083** | **27.539** | **85.622** |
| Bókað virði við ársbyrjan | 50.153 | 23.676 | 73.829 |
| | | | |
| Straksavskrivað av tølum og innbúgvi | | 0 | 0 |

| Samtak | | | | Norðoya Sparikassi | |
|---|---|---|---|---|---|
| 2008 | 2007 | | | 2008 | 2007 |
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | Viðm. | | | |
| | | 13 | **Aðrar ognir** | | |
| 3.732 | 6.083 | | Roknaðar rentur tilgóðar | 3.732 | 6.083 |
| 10.350 | 7.695 | | Aðrar ognir | 24.492 | 3.743 |
| **14.082** | **13.778** | | **Aðrar ognir tilsamans** | **28.224** | **9.826** |
| **119.866** | **220.000** | 14 | **Skuld til peningastovnar og tjóðbankar** | **119.866** | **190.000** |
| | | 15 | **Innlán** | | |
| 699.062 | 586.314 | | Uttan uppsøgn | 714.336 | 590.132 |
| 582.748 | 873.127 | | Við uppsøgn | 582.748 | 873.127 |
| 577.768 | 137.164 | | Tíðarinnskot | 577.768 | 137.164 |
| 134.231 | 109.630 | | Serinnlán | 134.231 | 109.630 |
| **1.993.809** | **1.706.235** | | **Innlán tilsamans** | **2.009.083** | **1.710.053** |
| 699.062 | 586.314 | | Uttan uppsøgn | 714.336 | 590.132 |
| 381.908 | 275.036 | | Uppsøgn til og við 3 mðr. | 381.908 | 275.036 |
| 738.280 | 764.637 | | Yvir 3 mðr. til og við 1 ár | 738.280 | 764.637 |
| 93.038 | 15.690 | | Yvir 1 ár til og við 5 ár | 93.038 | 15.690 |
| 81.521 | 64.558 | | Yvir 5 ár | 81.521 | 64.558 |
| **1.993.809** | **1.706.235** | | **Innlán tilsamans** | **2.009.083** | **1.710.053** |
| | | 16 | **Burturleggingar til útreiðslur** | | |
| 2.639 | 2.543 | | Treytaleys eftirlønartilsøgn | 2.639 | 2.543 |
| 747 | 3.036 | | Útsettur skattur | 747 | 423 |
| **3.386** | **5.579** | | **Burturleggingar til útreiðslur tilsamans** | **3.386** | **2.966** |
| | | 17 | **Ábyrgdarpeningur** | | |
| 6.912 | 4.779 | | Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 6.912 | 4.779 |
| 154 | 2.133 | | Tilgongd, netto | 154 | 2.133 |
| **7.066** | **6.912** | | **Ábyrgdarpeningur við ársenda** | **7.066** | **6.912** |
| | | 18 | **Tøl uttan fyri javnan** | | |
| 138.594 | 217.912 | | Fíggjarábyrgdir | 138.594 | 217.912 |
| 47.986 | 48.426 | | Aðrar ábyrgdir | 47.986 | 48.426 |
| 19.628 | 0 | | Aðrar skyldir | 19.628 | 0 |
| 8.401 | 14.782 | | Kredittilsagnir, ið ikki kunnu kallast aftur | 8.401 | 14.782 |
| **214.609** | **281.120** | | **Tøl uttan fyri javnan tilsamans** | **214.609** | **281.120** |

| Samtak 2008 1.000 DKK | Samtak 2007 1.000 DKK | Viðm. | | Norðoya Sparikassi 2008 1.000 DKK | Norðoya Sparikassi 2007 1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|---|
| | | 19 | **Stjórn og nevnd** | | |
| | | | Lán, veðhald, borgsskyldur ella ábyrgdir og trygdir, stovnað fyri stjórn og nevnd sparikassans | | |
| 4.320 | 2.857 | | Stjórn | 2.913 | 2.857 |
| 5.398 | 2.740 | | Nevnd | 3.940 | 2.740 |
| | | | Tilhoyrandi trygdir | | |
| 4.685 | 2.890 | | Stjórn | 3.090 | 2.890 |
| 8.561 | 4.929 | | Nevnd | 7.061 | 4.929 |
| | | 20 | **Kredittváðar- útlán býtt í vinnugreinir í %** | | |
| **0** | **0** | | **Almennir myndugleikar** | **0** | **0** |
| | | | **Vinnur** | | |
| 5 | 5 | | Fiskivinna | 5 | 5 |
| 5 | 5 | | Framleiðsluvinna o.a. | 5 | 5 |
| 4 | 4 | | Byggivinna | 4 | 4 |
| 10 | 11 | | Handil, matstovu- og gistingarhúsvinna | 10 | 11 |
| 2 | 2 | | Flutningur, postur og telefon | 2 | 2 |
| 0 | 0 | | Kreditt-, fíggingar- og tryggingarvinna | 0 | 0 |
| 10 | 12 | | Handil og umsiting av fastari ogn | 10 | 12 |
| 3 | 3 | | Aðrar vinnur | 3 | 3 |
| **39** | **42** | | **Vinnur tilsamans** | **39** | **42** |
| **61** | **58** | | **Privat** | **61** | **58** |
| **100** | **100** | | **Tilsamans** | **100** | **100** |
| | | 21 | **Marknaðarváðar** | | |
| | | | **Gjaldoyraváði** | | |
| 7.855 | 906 | | Ogn í fremmandum gjaldoyra | 7.855 | 906 |
| 4.541 | 303 | | Skuld í fremmandum gjaldoyra | 4.541 | 303 |
| 3.314 | 603 | | Gjaldoyraábending | 3.314 | 603 |
| 1,2 | 0,2 | | Gjaldoyraábending í % av kjarnukapitali aftaná frádráttir | 1,2 | 0,2 |
| | | 22 | **Rentuváðar** | | |
| | | | Rentuváði av fíggjartólum | | |
| 3.945 | 1.553 | | alt í DKK | 3.945 | 1.553 |

| Samtak 2008 | Samtak 2007 | Viðm. | | Norðoya Sparikassi 2008 | Norðoya Sparikassi 2007 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1.000 DKK | 1.000 DKK | | | 1.000 DKK | 1.000 DKK |
| | | 23 | **Skattur** | | |
| -9.347 | 4.913 | | Roknaður skattur av ársvinningi | -8.427 | 4.913 |
| 324 | 187 | | Útsettur skattur | 324 | 187 |
| 0 | 0 | | Javnan av roknaðum skatti | 0 | 0 |
| **-9.023** | **5.100** | | **Tilsamans** | **-8.103** | **5.100** |
| | | | | | |
| 18,00% | 18,00% | | Roknaður skattur | 18,00% | 18,00% |
| | | | Støðugt frávik – inntøkur og útreiðslur, | | |
| -7,50% | -1,88 | | ið ikki eru skattskyldugar | -3,75% | -1,26% |
| 3,57% | 0,61 | | Útsettur skattur | -0,68% | -0,01% |
| 0,00% | 0,00 | | Javnan av roknaðum skatti | 0,00% | 0,00% |
| **14,07%** | **16,73%** | | **Effektivt skattaprosent** | **13,57%** | **16,73%** |

# NÝTTUR ROKNSKAPARHÁTTUR

## Nýttur roknskaparháttur

Árs- og samtaksroknskapurin fyri 2008 hjá Norðoya Sparikassa er gjørdur í samsvari við lóg um bankar og sparikassar o.a. umframt kunngerð frá Fíggjareftirlitinum um framløgu av roknskapi hjá peningastovnum.

Nýtti roknskaparhátturin er tann sami, sum varð nýttur í 2007. Samanlíkningartølini fyri 2007 og 2008 eru uppgjørd eftir somu roknskaparkunngerð. Tó er ein broyting í virðisásetingum av óskrásettum partabrøvum, ið nú eru mett til dagsvirðið, í mun til keypsvirðið í 2007. Hetta viðførur eina regulering primo í eginpeninginum uppá 724 tkr.

## Samtaksroknskapurin

Samtaksroknskapurin fevnir um Norðoya Sparikassa, Sp/f Heim og Vørður, sum eru 100% ogn hjá Norðoya Sparikassa.

Roknskaparpostar við einsháttaðum innihaldi eru lagdir saman. Í samtaksroknskapinum eru innanhýsis inntøkur og útreiðslur tiknar burtur, og á sama hátt innanhýsis millumverandi.

Innanhýsis transaktiónir í samtakinum eru gjørdar samsvarandi marknaðartreytum.

Av tí at onki virksemi hevur verið síðan 2006 í P/f Hjá Eli, sum eisini er 100% ogn hjá Norðoya Sparikassa, er felagið ikki ein partur av samtaksroknskapinum. Fíggjarstøðan hjá P/f Hjá Eli javnvigar við 1,9 mió.kr., sum er tøkur peningur, og eginognin er 1,0 mió.kr. Felagið verður strikað í 2009.

## Tíðaravmarkingar

Rentuinntøkur o.a. og rentuútreiðslur o.a. eru fult út tíðaravmarkaðar, eins og allar aðrar avgerandi inntøkur og útreiðslur eru tíðaravmarkaðar.

## Kassapeningur, innlán uttan uppsøgn hjá tjóðbankum og ogn hjá peningastovnum

Hesar ognir eru tiknar við til áljóðandi virði.

## Útlán og onnur áogn

Sparikassans samlaðu ognir eru í samsvar við góðan og varnan roknskaparhátt undirgivnar eina atfinningarsama meting við atliti til avhyljing av tapsvandum, og tær neyðugu upphæddirnar eru avsettar. Staðfest tap ígjøgnum árið eru avskrivað fult út.

## Lánsbrøv, partabrøv og kapitalpartar

Goymsla sparikassans av keypsskálaskrásettum lánsbrøvum er sett til teir almennu kursirnar við ársenda 2008.
Goymsla sparikassans av partabrøvum, ið eru óskrásett, eru tiknar upp til dagsvirðið.
Kapitalpartar í tilknýttum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tikin upp til innara roknskarliga virðið við ársenda 2008.
Kapitalpartar í assosieraðum fyritøkum, ið eru óskrásett partabrøv, eru tikin upp til innara roknskarliga virðið við ársenda 2008, við frádrátti av órealiseraðum uppskrivingum.

### Fastar ognir

Fastar ognir eru virðissettar til útveganarvirði við frádrátti av av- og niðurskrivingum.  Ognir, sum sparikassin hevur ognað sær til egna nýtslu, verða avskrivaðar yvir 50 ár.

Íløguognir og ognir, sum sparikassin hevur yvirtikið í samband við uppgerð av millumverandi og sum skulu seljast, verða javnaðar við støði í innanhýsis meting av ognum. Niðurskrivingar verða førdar yvir raksturin, meðan uppskrivingar verða førdar yvir eginpeningin.

### Maskinur og innbúgv

Maskinur og innbúgv eru sett til keypsvirðið frádrigið avskrivingar. Avskrivað verður rættlinjað í tíðarskeiðinum, ognirnar kunnu hugsast vera haldgóðar.

### Fremmant gjaldoyra

Goymslan í fremmandum gjaldoyra er sett til skrásettu kursirnar við ársenda.

### Innlán og onnur skuld

Innlán og onnur skuld eru upptikin til áljóðandi virði.

### Skattur

Skattur av ársinntøkuni og broytingar í útsettum skatti er útreiðsluført.

www.ns.fo